


Heri Simonsen

James Olsen

# Firmakapping við stórari undirtøku

Birgir Waag Høgnesen

Heili 93 fyritøkur hava meldað til Firmakappingina hjá Rás2 á hesum sinni. Kappingin í ár er skipað í fimm lokaløkjum, og hevur hetta fingið góða undirtøku frá bæði luttakarum og lurtarum kring landið

Firmakappingin hjá Rás2 henda veturin hevur fingið eina kollveltandi broyting í mun til hini árini kappingin hevur verið á breddanum. Tað hevur verið rættiliga torført at fáa nóg nógvar fyritøkur uttanfyri høvuðsstaðarøkið at melda til kappingina, og tí varð avrátt at broyta leistin kappingin er skipað eftir. Hendan veturin er kappingin skipað í fimm lokaløki. Suðurøkið sum fevnir um Suðuroynna og Sandoynna. Vesturøkið sum fevnir um Vágar og vestara partin av Streymoynni. Eysturøkið sum fevnir um norðara partin av Sundalagnum og Eysturoynna. Norðurøkið sum fevnir um Norðoyggjar, og so høvuðsstaðarøkið, sum fevnir um Havnina, Argir, Hoyvík og Kollafjørð. Og hetta setti veruliga gongd á luttakaratalið av bygd. Og eru 48 tilmeldingar uttanfyri høvuðsstaðarøkið.

## Stór finaluvika fyrst í januar

Fyrst í januar verður ein stór finaluvika á Rás2, har tríggjar økisfinalur verða á skránni. Talan verður um finalurnar í vesturøkinum, suðurøkinum, og í norðurøkinum. Fyritøkan sum vinnur økisfinaluna fær eitt steyp til áminningar um tann lokala sigurin, og sleppur víðari til ta stóru meistarakappingina, har teir fimm økisvinnarnir fara at kappast um rættin at koma í ta stóru finaluna, har tann vinnandi fyritøkan vinnur eina firmaferð fyri 20 fólk við Norrønu. Í samband við tær lokalu finalurnar, sum verða avgreiddar beinleiðis á Rás2, verður eitt prát við stjórarnar/arbeiðsleiðarnar hjá fyritøkunum, sum taka lut í teimum lokalu finalunum. Finalan í vesturøkinum, mánadagin 3. januar klokkan 11.25, verður millum Vága Kommunu og mekanisku deildina hjá Atlantic Airways. Finalan í suðurøkinum, týsdagin 4. januar klokkan 11.25, verður millum Strandferðsluna og Radioservice í Vági. Finalan í norðurøkinum, fríggjadagin 7. januar, verður millum Fonnflog og Reyniservice. Vertir í sendingunum eru teir báðir Heri Simonsen og James Olsen. Hvør vinnur endaliga vinningin, sum er ein ferð fyri 15 starvsfólk við Norrønu, fæst at vita í 2011.

*birgir@sosialurin.fo*

### Vesturøkið innleiðandi:

Sandavágs Timburhandil/Kovin - Atlantic Airways tekniska deild 15-18 *(av 21)*
H Dygd Vatnsoyrar - FK Miðvágur 17-15 *(av 21)*
Vága Floghavn - Hotel 62 Norður 16-15 *(av 21)*
Luna - Vága Kommuna 12-18 *(av 21)*
Vestpack-Vágatunnilin 16-15 *(av 21)*
Vesturøki Undanhálvfinala :
H Dygd - Vága Floghavn 17-21 *(av 21)*

### Vesturøki Hálvfinala 1:

Vestpack - Atlantic Airways Mekaniska Deild 14-16 *(av 21)*

### Vesturøki Hálvfinala 2:

Vága Floghavn - Vága Kommuna 8-19 *(av 21)*

### Suðurøkið innleiðandi:

Radioservice í Vági - Bónus Tvøroyri 12-9 *(av 24, eykaspurningur)*
TAKS Tvøroyri - Almannastovan Tvøroyri 14-10 *(av 21)*
Sandoy Seafood - Fysiourgiska Deild Tvøroyri 15-14 *(av 21)*
Vágs Kommuna - Tvøroyrar Kommuna 15-11 *(av 21)*
Strandferðslan - Tangavirkið Vágur 15-14 *(av 21)*

### Suðurøkið undanhálvfinala:

Sandoy Seafood - Vágs Kommuna 12-15 *(av 21)*

### Suðurøkið hálvfinala 1:

Taks Tvøroyri - Radioservice í Vági 11-17 *(av 21)*

### Suðurøkið hálvfinala 2:

Vágs Kommuna - Strandferðslan 11-12 *(av 24, eykaspurningur)*

### Norðurøkið innleiðandi:

FonnFlog - Looknorth 16-12 *(av 21)*
KBI - Reyni Service í Klaksvík 15-16 *(av 21)*
EL-IN - Vøruhúsið í Klaksvík 15-14 *(av 21)*
Norðoya Apotek - Sjúkraflutningurin Klaksvíkar Sjúkrahús 12-15 *(av 21)*
Klaksvíkar Kommuna - Bónus í Klaksvík 15-12 *(av 21)*

### Norðurøkið undanhálvfinala:

Klaksvíkar Kommuna - Sjúkraflutningurin Klaksvíkar Sjúkrahús 15-9 *(av 21)*
Norðurøkið Hálvfinala 1 :
FonnFlog – EL-IN 12-11 (av 21)

### Norðurøkið Hálvfinala 2:

Sjúkraflutningurin Klaksvíkar Sjúkrahús – Reyni Service Klaksvík 14 – 15 *(av 21)*